# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*– Hatta var ræðuligt*

*Símun Rógvi Hansen, HB*

HB-B36 2-2 (2-2):

# Ársins brak í Gundadali

*HB*

*B36*

**Undirhaldsvirðið var fleirfalt tað, sum atgongumerkini til grannauppgerðina í Gundadali kostaðu. Men tað stendur framvegis á jøvnum, nú tvey av teimum trimum sløgunum um Havnina eru spæld**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Undirhaldsvirðið fæst neyvan betri enn tað sama í føroyskum fótbólti.

Grannauppgerðin millum HB og B36 hóskvøldið var ein sannur klassikari av tí slagnum, sum viðhaldsfólk hjá báðum pørtum uttan iva fara at tosa nógv um komandi dagarnar, vikurnar og kanska mánaðirnar. Við allari virðing fyri kvennkyninum, so var talan um sannan mannfólkadyst.

Vøkur mál, løgin mál, kolldømd mál, hópatals nærdystir, harðar tacklingar, høg leikferð og ein ótrúligur intensitetur vóru kryddið í grýtuni, sum tó tók sína lítlu løtu at koma upp á kók. Men tá fyrsta korterið var farið, stóð dramatikkur og spenningur á skránni fyri rest.

### HB hvassari

Fyrstu løtuna skuldu liðini líka sum finna seg til rættis á vøllinum, og uttan tann heilt stóra dramatikkin kendu tey eftir, hvussu hvassar tenn mótstøðuparturin hevði.

B36 var liðið, sum royndi seg við einum meira agressivum pressi á miðvøllinum, men neyvleikin tóktist tó vanta í avgerandi støðunum.

Og í avgerandi støðunum tóktist HB eisini vera liðið, sum var hvassari, og sum dugdi betur at sveiggja hamaran, tá møguleikin var til tess.

Fyrra málið var klokkuklárt dømi um hetta, tá B36 gav Andrew av Fløtum pláss og tíð at venda, og við 2-1 málið bakkaði verjan fyri Pàlli Mohr Joensen, áðrenn Andrew sjálvur stóð sera ómarkeraður, tá hann endaði álopið.

Men í báðum førum var altso talan um støður, har HB hevði klassan til at gera sær dælt av teimum fáu mistøkunum, sum grannarnir framdu, og frá 2-1 til droppið, sum kostaði 2-2, sat HB á dystinum.

### Agressivir tikarar

Tað kann væl vera, at HB á stigatalvuni hevði dupult so stóra úrtøku, sum B36. Og tað skuldi eisini eitt dropp til, áðrenn B36 aftur slapp inn í dystin móti liðnum, sum í løtuni má rópast tað besta í føroyskum fótbólti.

Men tá tað er sagt, so er eingin ivi um, at dystirin so ruddiliga prógvaði, at í eini grannauppgerð er tað ikki altíð støðan á talvuni, sum sigur mest.

Og í øllum førum var hetta ikki nakað, sum teir í B36 góvu stórvegis ans. Í longum løtum av dystinum trýstu teir HB-liðið yvir allan vøllin, og hóast tað ikki gjørdist talan um so øgiliga opnar møguleikar, so vórðu áskoðararnir støðugt hildnir á nálum. Ikki minst tí HB fleiri ferðir hevði sínar heilt góðu løtur, har bólturin koyrdi skjótt kring allan vøllin, har teir høvdu hug at koyra móstøðuna troytta í støðugum tríkantsspæli.

Og so gav ágangandi spælistílurin hjá hvítu tikarunum, sum annars hava verið sera tamir seinastu nógvu umførini, hópin av intensum tvídystum. Hans á Lag og Brima Koroma høvdu sínar nógvu dystir. Tað sama høvdu Klæmint Matras og Róaldur Jacobsen móti Fróða Benjaminsen og Kára Nielsen, meðan tað í borðunum snúi seg um Pætur Jørgensen móti Bergi Midjord og Johan Ellingsgaard móti Rógva Poulsen. Aftur hesi elementini, sum gera ein fótbóltsdyst verdan at hyggja at.

### Kolldømdu málini

Og spenningurin gjørdist ikki minni, tá dysturin samstundis innihelt heili fýra kolldømd mál, umframt onkra sera ivasama off-side støðu.

B36 helt seg annars hava vunnið seg upp á 1-0, tá Johan Ellingsgaard stútaði frísparksinnlegg í kassan, men tað helt linjuverjin ikki.

Og í seinna hálvleiki bara øktist talið av støðum, har dómarin slapp í fokus. Tað liktist einum brotssparki, tá Páll Mohr Joensen fór um koll í brotsteiginum, men dómarin læt ikki við seg koma.

Eitt HB-mál varð longu kolldømt fyri fríspark móti Jóan Paula Jakobsen, tá Brima Koroma helt seg hava skotið B36 framum. Og ónøgdin um rangstøðudómin var somikið stór, at Jákup á Borg fekk gult kort.

Í HB-leguni høvdu tey ilt við at síggja rangstøðuna, tá innskifti Tróndur Sigurðsson var fyrstur á returbólti og sendi í netið, og í yvirtíðini kom veruliga kók í B36-skýlið, tá tey høvdu meira enn ilt við at síggja, hvussu púra blanki Sjúrður Thomassen kundi standa rangstaddur, tá tey flestu hildu at verjuspælari í hinum borðinum var metrar innanfyri.

Skeivir dómar ella ikki. Í øllum eru slíkar støður eisini støður, sum hoyra einum braki til. Og longu við kaffiborðið í morgun hava diskussiónirnar um bæði eina og aðra av støðunum verið nógvar.



**Málini í Gundadali**

**1-0: Rógvi Poulsen, 23. min**
Andrew av Fløtum fær pláss at venda sær, tá hann verður spældur beint á, og sera hegnisliga stingur hann djúpt til Rógva, sum við fullari ferð er á veg inn um B36-verjuna

**1-1: Bergur Midjord, 28 min.**
Samanspæl millum Róald Jacobsen og Klæmint Matras endar við innleggi frá tí seinna nevnda, og áraka fimm-meturin er Bergur hægstur og stútar inn um stólparótina

**2-1: Andrew av Fløtum, 33 min.**
Páll Mohr Joensen fær góða tíð at reka, og umvegis Andrew endar bólturin úti hjá Rógva. Hann smýgur sær at baklinjuni, og tá flata innleggið kemur út til Andrew, bankar hann bóltin í kassan

**2-2: Magnus Olsen, 41 min.**
Frísparksinnleggið úr 40 metrum tykist púra vandaleyst, tá Símun Rógvi og Hans á Lag misskilja hvønn annan somikið illa, at bólturin ferðast inn um Símun Rógva og beint í meskarnar

*Brima Koroma og Hans á Lag vóru bara tveir av mongum, sum høvdu hópin av hørðum tvídystum sínamillum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Ræðuligt

Símun Rógvi Hansen hevði tvær vitalar bjargingar eftir steðgin, men fyrst og fremst varð hann sjónligur, tá B36 javnaði til 2-2.

– Hatta var ræðuligt. Eg rópi nakað seint á Hans, sum bukkar seg undan bóltinum, og so missi eg upp á onkran máta bóltin, sum fer beint í málið, staðfesti Símun Rógvi beint eftir dystin.

*Men tit eru framvegis átta stig á odda. Hevur tað ikki nakað at siga í kvøld?*

- Tað er sjálvandi gott. Men tað er bara ikki nóg gott, at hasin bólturin slapp at ferðast í málið, segði HB-málverjin.

**-mørk**

## Ónøgdir

Hóast B36 sambært stigatalvuni var lítlibeiggin í uppgerðini, var Herbert í Lon Jacobsen alt annað enn nøgdur um javnleikin hóskvøldið.

- Eg eri ræðuliga ónøgdur. Eg haldi ikki, at teir skapa sær nakrar veruligar málmøguleikar yvirhøvur. Teir koma at baklinjuni viðhvørt, og teir skora so hasi bæði málini, men í aðrar mátar sita vit á tí mesta, og eg eri øgiliga skuffaður um, at vit ikki klára at avgera dystin, segði Herbert eftir dystin.

*Tit tykjast vera komnir ígongd eftir fleiri tap á rað. Er tað keðiligt, at summarsteðgurin kemur júst nú?*

- Tað er tað kanska. Vit hava kanska ikki vunnið nóg nógv, men vit hava ikki tapt í fýra dystir, so kanaska skuldu vit ikki havt nakran steðg nú. Men í kvøld skuldu vit altso havt vunnið øll stigini, og tað irriterar meg, segði Herbert í Lon Jacobsen.

**-mørk**